# EITT LÍVSSTARV



**TRUKKFØRARI** At tað krevur sín mann at koyra ein trukk, er 45 ára gamli Jan Johannesen av Oyri eitt gott dømi um. Hann hevur koyrt trukk ein stóran part av lívi sínum, og ger tað framvegis. – Ein krevur allatíðina at konsentrera seg og hava eyguni við sær. Annars kann tað skjótt blíva farligt, serliga inni á virkinum, slær hann fast.

Tekstur: Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang

Eiði: Uttanfyri oysir regnið niður, men her inni á virkinum "Bátafiskur" lata tey ikki við seg koma í dag.

Í sjálvari høllini eru fiskafólkini til arbeiðis. Inni í einum øðrum høli sita ein kvinna og ein maður og kanna nøkur skjøl. Á skránni er innaneftirlit.

Men inni í høllini, goymsluni og um neyðugt uttanfyri er Jan í ferð við enn ein dag í langa lívi sínum sum trukkførari.

Við bláa keppi sínum og teirri eyðkendu reyðu thermodraktini er hann millumliðið millum útróðrarbátarnar, starvsfólkini, goymsluna og teir ið koma eftir teimum lidnu vørunum.

– Hetta er eitt sera gott arbeiði, slær Oyra-maðurin fast.

Henda morgunin var hann farin heldur seint til arbeiðis – ikki fyrrenn klokkan átta. Men so heldur hann eisini á til dagsverkið er lokið.

– Nær eg so fari til hús aftur? Nei, tað er einki fast klokkuslett. Eg fari ikki til hús fyrrenn alt er liðugt, sigur hann brosandi.

## » Nær eg so fari til hús aftur? Nei, tað er einki fast klokkuslett. Eg fari ikki til hús fyrrenn alt er liðugt

### Fisk og rækjur

Tað er ikki hvørjum manni beskorið at hava kunnað koyrt trukk meginpartin av lívi sínum.

Jan byrjaði at koyra trukk í 1986, um tað mundið, tá nógv virksemi var í Rækjuvirkinum á Oyri. Jan búði soleiðis fyri, at tað var bæði stutt og einfalt hjá honum at ganga ella súkkla til arbeiðis.

Hansara starv kom at vera trukkførari, og eftir at hava gjørt hetta í trý ár, varð hann av leiðsluni biðin um at fara á eitt skeið.

- Og her koyrdi eg heilt fram til virkið læt aftur nøkur ár seinni, greiðir hann frá.

Seinni fekk hann millum annað arbeiði á flakavirkinum í Haldórsvík, men nú er hann fastur trukkførari her hjá Bátafiski.

– Her er gott at vera, men mær dámdi eisini heilt einastandandi væl á Rækjuvirkinum.

### Ringur mars

Bátafiskur á Eiði er eitt av virkjunum, ið serliga tekur ímóti fiski frá útróðrarbátunum.

Hetta hevur so aftur við sær, at tað til tíðir kann koma sera nógvur fiskur uppá land, meðan tað til aðrar tíðir er heldur slakari. Onkutíð verður eisini fiskur keyptur til virkið.

Tá bátarnir koma inn at avreiða á Eiði ræður um eitt hjá virkinum: At hava gott fólk við kranan; gott og roynt fólk í trukkinum, ið skal syrgja fyri at veiðan kemur undir tak sum skjótast; og góð arbeiðsfólk inni á virkinum.

– Til tíðir kann vera rættiliga nógv at gera, greiðir Jan frá. Tað man kortini neyvan vera nakar ivi um, at tey á virkinum somuleiðis kundu havt ynskt sær meiri av várróðrinum í ár.

Tað eru helst eisini fleiri útróðrarmenn sum høvdu væntað og vónað tað sama. Henda besta tíðin á Norðhavinum hevur verið nógv merkt av illveðri og ringum likindum til útróður. Og tað hevði so aftur ávirkað arbeiðið hjá Bátafiski.

– Nei, mars mánaður í ár, hann riggaði stak illa til veður, slær Jan fast.

### Tá alt er liðugt

Arbeiðsfólkið á Bátafiski møtir vanliga klokkan 8 á morgni, men tá hevur Jan longu verið á vakt í ein tíma.

Hansara uppgáva er at skipa so fyri, at klárt er at tendra maskinurnar stundisliga, so framleiðslan kann byrja. Og so kemur ferð á arbeiði hansara:

Samstundis, sum hann skal fáa nýveidda fiskin inn á goymsluna, skal hann haraftrat syrgja fyri at flakamaskinurnar ikki steðga upp, tí eingin fiskur er at arbeiða undan. Og tá ein plattur er fullur við eskjum, skal hann setast inn í sína goymslu.

Í slíkum umstøðum er gott hjá arbeiðsfólki og leiðslu at vita, at tað er ein royndur maður sum koyrir trukkin.

– Jú, tað kann mangan vera strævið. Men so vil eg eisini siga, at fortjenastan er ikki so galin, staðfestir hann við einum brosi.

snorri@sosialurin.fo

## » Tað kann mangan vera strævið. Men so vil eg eisini siga, at fortjenastan er ikki so galin